

# Samfelagið – eg og vit øll

## Arbeiðshefti til samfelagsfrøði í 9. flokki.

Hetta heftið er ikki ein læraravegleiðing, men eitt savn við eykauppgávum til “Samfelagið – eg og vit øll”, ið leggur dent á førleikamenning. Læraravegleiðingin til Samfelagið – og eg” var bæði ein læraravegleiðing og eitt uppgávusavn. Fyrstu 17 síðurnar av heftinum eru at meta sum felags læraravegleiðing fyri alla bókaheildina, meðan seinna helvtin av heftinum eru eykauppgávur til fyrstu bókina.

Annars verður víst til fororðið í “Samfelagið – eg og vit øll”. Nevnast skal eisini, at á Snar eru fleiri tema, ið kunnu nýtast í samfelagsfrøðiundirvísingini: https://snar.fo/snar/tema/samfelag-og-soega

Samfelagsfrøðligu førleikarnir eiga at verða vandir í sambandi við øll kjarnaøkini. Hóast allir førleikar sjálvandi ikki kunnu verða vandir alla tíðina, eiga allir fakligir førleikar at verða vandir á hvørjum ári, so at næmingarnir fáa høvi at byggja víðari á undanfarnar royndir.

Førleikarnir eru orðaðir í tveimum setningum. Tann fyrri setningurin orðar grundleggjandi fakligar førleikar, meðan tann seinni orðar eina víðkaða fatan av førleikunum. Dugnaligastu næmingarnir eiga at megna tað seinna, meðan allir eiga at megna tað fyrra. Hetta eggjar til, at undirvísingin verður tillagað og ger hana meira fjøltáttaða. T.d. kann verða arbeitt við sama evni, har næmingarnir fáa hóskandi venjingar, sum førka teir víðari. Nevnast skal somuleiðis, at tað eru sera ymiskir hættir at menna hesar førleikar, og tað er tann einstaki lærarin, sum velur hóskandi háttalag.

Næmingurin dugir:

- At lesa samfelagsfakligar tekstir. At samanbera og meta um samfelagsfakligar tekstir.
- At lesa einfaldar hagtalsmyndir og tabellir. At lesa størri, torskildari hagtalstilfar, umframt at samanbera ymisk hagtøl.
- At lesa og endurgeva einfaldar hugtaksmyndlar. At knýta hugtaksmyndlar til kvantitativa og kvalitativa vitan.
- At orða fakligar ivamálsorðingar og svara teimum. At skilja millum ivamálsorðingar og háttaløg á ymiskum taksonomiskum stigum (Bloom).
- At fremja samfelagsfrøðiligar kanningar, bæði av kvalitativum og kvantitativum slagi. At skilja, nær teir ymisku kanningarhættirnir eru hóskandi at brúka.
- At leggja fram faklig úrslit munnliga. At brúka ymiskar framløguhættir, m.a. eisini at brúka KT at stuðla framløgur við.
- At eygleiða einfaldar samfelagsligar samanhangir í nærumhvørvinum. At gera kanningararbeiði úti í samfelagnum, har smærri einfaldar samrøður ella spurnakanningar verða nýttar.
- At leita sær týðandi og álítandi vitan, bæði gjøgnum internetið og fysiskar miðlar. At nýta grundleggjandi keldukritikk.

# 1 Mentan og tilflyting

Undirvísingargongdir:

- Mentanarkanning
- Flytingarmynstur




Mynd: Napoleon Smith, 2019



# Mentanarkanning

Næmingabók, síða 5-11

Førleikar:

- At eygleiða einfaldar samfelagsligar samanhangir í nærumhvørvinum. At gera kanningararbeiði úti í samfelagnum, har smærri einfaldar samrøður ella spurnakanningar verða nýttar.

Títt lív og tín gerandisdagur eru fylt við nógvum ymiskum persónum, tingum, støðum og aktivitetum. Ger eitt hugarok av tíni egnu mentan. Innast eru tey fyribrigdi, ið henda gerandis, síðani koma fyribrigdi, ið henda vikuliga. Uttast eru fyribrigdi, ið henda mánaðarliga. Hvussu er tín egna mentan samansett?

Eftir hetta kanst tú samanbera við aðrar næmingar.




Aftaná kunnu tit kjakast í flokkinum um hvat eyðkennir føroyska mentan. Eg munur á mentanini í ymiskum økjum í Føroyum?



# Flytingarmynstur

Næmingabók, síða 13-18

Førleikar:

- At lesa einfaldar hagtalsmyndir og tabellir. At lesa størri, torskildari hagtalstilfar, umframt at samanbera ymisk hagtøl.
- At fremja samfelagsfrøðiligar kanningar, bæði av kvalitativum og kvantitativum slagi. At skilja, nær teir ymisku kanningarhættirnir eru hóskandi at brúka.
- At leita sær týðandi og álítandi vitan, bæði gjøgnum internetið og fysiskar miðlar. At nýta grundleggjandi keldukritikk.

Á Hagstovuni (hagstova.fo) er eina hagtalsgrunnur, ið nevnist “Innlendis flyting”. Hann er at finna undir “Íbúgvar og val”.

- Finn út av hvussu nógv fólk eru flutt úr øðrum bygdum til tína bygd.
- Finn síðani út av hvussu nógv fólk eru flutt úr øðrum kommunum til tína kommunu.
- Finn at enda út av hvussu nógv fólk eru flutt úr øðrum økjum til títt øki.

Tú kanst eisini samanseta leitingar, soleiðis at tú kannar hvussu nógv fólk eru flutt úr einum ávísum øki til eina ávísa bygd.

Til ber eisini at fáa heimasíðuna at tekna tølini sum grafar. Tá verða tølini týðiligari at lesa. (Sí niðanfyri)







IB03080 Innlendis flyting (1985-2018)

| | 1985 | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 | 1990 | 1991 | 1992 | 1993 | 1994 | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Frá Suðurstreymoyar øki | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Til Norðstreymoyar øki | 63 | 55 | 66 | 87 | 68 | 42 | 51 | 73 | 62 | 23 | 67 | 82 | 85 | 68 | 75 | 52 | 81 | 91 | 86 | 85 | 72 | 104 | 95 | 124 | 74 | 87 | 90 | 78 | 74 | 90 | 106 | 93 | 108 | 71 |

# Fordómar og stereotypur

Nævningabók, síða 20-27

Førleikar

- At eygleiða einfaldar samfelagsligar samanhangir í nærumhvørvinum. At gera kanningararbeiði úti í samfelagnum, har smærri einfaldar samrøður ella spurnakanningar verða nýttar.
- At leita sær týðandi og álítandi vitan, bæði gjøgnum internetið og fysiskar miðlar. At nýta grundleggjandi keldukritikk.
- At leggja fram faklig úrslit munnliga. At brúka ymiskar framløguhættir, m.a. eisini at brúka KT at stuðla framløgur við.

Tá vit hugsa um útlendingar, hugsa vit ofta um nakrar serligar eginleikar við hesum fólkasløgum. Hóast russar, týskarar, kinesarar o.s.fr. eru sera ymiskir, hava vit ofta eina einfaldgjørda fatan av hvussu fólkini munnu vera. Á myndini niðanfyri eru nøkur dømi um stereotypur av fólkasløgum. Kenna tit tær aftur?




Býtið flokkin upp í 5 bólkar. Hvør bólkur velur síðani eitt land at viðgera. Tó mugu allir bólkar hava ymisk lond! Hvør bólkur fær uppgávuna at skriva 10 eginleikar hjá íbúgvunum í valda landinum. Hetta verður skrivað niður á eitt papír. Eftir hetta fara øll papírini á rundferð til hinar bólkarnar. Hvør bólkur leggur ein eginleika afturat, ið vantar á papírinum. At enda kemur papírið aftur til upprunabólkarnar, ið evna til eina plakat, har eginleikarnir eru bólkaðir sum jaligir, neutralir og neiligir. Finnið eisini fram myndir, ið vísa ymiskar av eginleikunum. Bólkarnir mugu hava møguleika at leita sær vitan á Internetinum. Eftir hetta leggja bólkarnir fram sína plakat og meta um hvussu eftirfarandi ymisku eginleikarnir eru.

# 2 Kærleiki og kynslív

Undirvísingargongdir:

- Kærleiki
- Familja og samlív
- Kynslív og verja




Mynd: Napoleon Smith, 2019

# Kærleiki

Næmingabók, síða 31-37

Førleikar

- At lesa samfelagsfakligar tekstir. At samanbera og meta um samfelagsfakligar tekstir.
- At lesa og endurgeva einfaldar hugtaksmyndlar. At knýta hugtaksmyndlar til kvantitativa og kvalitativa vitan.
- At eygleiða einfaldar samfelagsligar samanhangir í nærumhvørvinum. At gera kanningararbeiði úti í samfelagnum, har smærri einfaldar samrøður ella spurnakanningar verða nýttar.

Tað finnast ymiskar stereotypur av kærleika, millum annað agape, philia, eros og storge. Hesar kunnu setast upp í eina talvu:

| | |
|---|---|
| **Agape:** Stóri, andaligi kærleikin. Djúpur, altfevnandi kærleiki. Ósjálvsøkin kærleiki uttan fyrivarni ella treytir. Kærleiki, ið gevur uttan at vænta nakað afturfyri. Gevur, tí hann ikki kann lata vera. Kærleikin, ið foreldur kenna fyri síni børn. Kærleikin, sum vit øll langtast eftir og vilja fevnast av. Fyri trúgvandi eisini tann kærleiki, ið Gud elskar menniskju við og sum trúgvandi elska Gud við. | **Philia:** Sinnisligi kærleikin, har man gevur og tekur. Kærleikin, har man livir í einum javnbjóðis forholdi við vinur og onnur, man kennir seg knýttan at. Heil samfeløg kunu eisini liva í philia. Philia snýr seg um reinlæti, trúnað og atlit. Hann snýr seg um javnvág millum at geva og taka. Tað er vanliga ein kærleiki uttan kropsliga handling bæði millum familjulimir, vinir og elskandi. |
| **Eros:** Erotiski og romantiski kærleikin. Atdráttarmegi, langtan í mánaskini og mussir eina ljósa summarnátt. Kærleikin til mannin/kvinnuna, sum vit eru par við. Forelskilsið og langa samlívið. Kærleikin, ið minnir um okkum um Hollywood-filmar. Eros er eisini ynskið um kropsliga og kynsliga samveru. | **Storge:** Familjukærleikin. Tøttu bondini, ið ikki kunnu slítast, um man er saman ella burturstaddur. Serliga foreldakærleikin at sínum børnum, kærleikin, ið heldur líkamikið hvat barnið hevur gjørt ella stendur fyri. Eisini onnur familjubond eru fevnd av storge. Hesin kærleikin kann ikki loysast, men er bundin í allar ævir, eisini hóast kærleikin ikki verður endurgoldin. |

Finnið ymiskar føroyskar kærleikssangir í songbókum, sálmabókum ella á Netinum. Hvørji sløg av kærleika umtala teir? Tit kunnu byrja við dømunum Eros og Blóman.

| | |
|---|---|
| **Eros** (Frændur)<br><br>Vilt tú ikki sita her eina løtu nú hjá mær,<br>so eg kann kína og kyssa teg og vera tær so nær.<br><br>Nú býurin skjótt sova skal, og myrkrið biður góða nátt,<br>legg teg bara her so væl, fevn og kroyst mín kropp.<br><br>Vit gloyma dagsins strev. Í morgin er aftur frídagur,<br>og Eros so loyndarfullur lær, bara hann okkum sær.<br><br>Nú sólin sendir geislar inn í eina lítla lon so veik.<br>Har liggja tvey saman ballað skinn eftir ástarleik.<br><br>Um vit gloyma dagsins stríð, geva hvørjum øðrum tíð.<br>Kann Eros ikki halda frí? Tað leggur hann einki í.<br><br>Tú mást ei fara heim í kvøld. Verð nú her hjá mær,<br>so eg kann merkja tín mjúka kropp heilt nær at mær. | **Blóman** (Poul F. Joensen)<br><br>Fagra blóma, tú sum prýðir<br>fjallatindar, berg og skørð,<br>bø og ong og grønar líðir,<br>hvat er fagrari á jørð?<br>Eina blómu tó eg kenni,<br>fagrast hon av øllum er,<br>sjálvt ei rósan líkist henni,<br>tað er hon, eg valdi mær.<br><br>Blómur spretta móti vári,<br>følna tá íð heystið er.<br>Mín hon blóma man alt árið,<br>sjálvt um kalt og kavi er.<br>Einaferð hon bert kann blóma,<br>følnar hon, eg følni við.<br>Fylgja skal eg blómu míni<br>til tann síðsta hvíldarfrið. |



# Familja og samlív

Næmingabók, síða 38-41

Førleikar

- At lesa og endurgeva einfaldar hugtaksmyndlar. At knýta hugtaksmyndlar til kvantitativa og kvalitativa vitan.
- At eygleiða einfaldar samfelagsligar samanhangir í nærumhvørvinum. At gera kanningararbeiði úti í samfelagnum, har smærri einfaldar samrøður ella spurnakanningar verða nýttar.

Familjur eru ikki skipaðar á sama hátt í dag sum fyri 100 ella 200 árum síðani. Í talvuni sæst hvussu familjur kundu vera skipaðar í landbúnaðar- og fiskivinnusamfeløgunum. Men hvussu er støðan í dag? Skriva í talvuna hvussu tín familja er skipað.

| Samfelag → Familjulimir↓ | Landbúnaðarsamfelag, uml. 1820 | Fiskivinnusamfelag, uml. 1920 | Tænastusamfelagið í dag, uml. 2020 |
|---|---|---|---|
| **Pápi** | Stýrir familjuni. Ger tunga bóndaarbeiðið. | Pápin siglir úti og er sjáldan heima. Ger umvælingar, tá hann er heima. | |
| **Mamma** | Ger húsliga arbeiðið og ansar minstu børnunum. Ger lættari bóndaarbeiði. | Stýrir familjuni. Ger mesta húsliga arbeiðið. Ansar eftir børnunum. | |
| **Yngri børn** | Hjálpa til í húsi og bóndaskapi. Ganga ikki í skúla ella á stovni. | Verða ansað heima av mammuni. Tá tey gerast størri, fara tey í skúla. | |
| **Eldri børn** | Hjálpa foreldrunum við arbeiðnum. Ganga ikki í skúla. Kunnu tæna hjá ríkari familjum. | Ganga í skúla til tey verða fermd og fara síðani til skips ella at tæna. Bert fá útbúgva seg. | |
| **Abbar/ommur** | Búgva hjá børnum sínum og hjálpa til við ymiskum, millum annað barnaansing. | Búgva fyri seg sjálvi í húsum nærhendis hjá børnunum. Hjálpa til við at ansa eftir barnabørnum. | |

# Kynslív og verja

Næmingabók, síða 42-54

Førleikar:

- At lesa og endurgeva einfaldar hugtaksmyndlar. At knýta hugtaksmyndlar til kvantitativa og kvalitativa vitan.
- At leggja fram faklig úrslit munnliga. At brúka ymiskar framløguhættir, m.a. eisini at brúka KT at stuðla framløgur við.

Fólkaheilsuráðið, Føroya Politi, Amnesty International og Sig frá/Almannamálaráðið hava í fleiri ár skipað fyri átaknum "Sex krevur samtykki!". Millum annað skriva tey soleiðis á heimasíðuni hjá Amnesty:

> SEX SKJÓT UM SAMTYKKI:
>
> 1. Samtykki kann bara gevast. Ikki takast!
> 2. Samtykki kann tó altíð takast aftur!
> 3. Samtykki krevur vit!
> 4. Samtykki krevur hug!
> 5. Samtykki er ítøkiligt. Tað merkir, at JA til A merkir ikki JA til B, og eitt JA nú merkir ikki JA um eina løtu.
> 6. Sex krevur samtykki!

Kjakist fyrst um hesi seks punktini, hvat tey merkja og hvussu tey skulu skiljast/tulkast.

Gerið síðani eitt leiklutaspæl í flokkinum, har næmingarnir koma út fyri tær seks støðurnar, ið eru nevndar omanfyri. Næmingarnir kunnu skiftast um at spæla leiklutirnar.

Les meiri um evnið á heimasíðuni hjá Amnesty International (Amnesty.fo)



# 3 Mannarættindi og hugsjónir

Undirvísingargongdir:

- Mannarættindi
- Hugsjónir
- Javnstøða




Mynd: Napoleon Smith, 2019

# Mannarættindi

Næmingabók, síða 58-70

Førleikar:

- At fremja samfelagsfrøðiligar kanningar, bæði av kvalitativum og kvantitativum slagi. At skilja, nær teir ymisku kanningarhættirnir eru hóskandi at brúka.
- At eygleiða einfaldar samfelagsligar samanhangir í nærumhvørvinum. At gera kanningararbeiði úti í samfelagnum, har smærri einfaldar samrøður ella spurnakanningar verða nýttar.

Kopiera hetta spurnaskjalið út til allar næmingar í flokkinum. Eftir hetta telur lærarin ella ein næmingur upp svarini á talvuna ella í eitt skjal. Rokna síðani meðaltøl út fyri svarini. (Duga tit væl við KT, ber til at telja alt upp í Excel ella enntá koyra spurnaskjalið inn í Forms, ið telur upp av sær sjálvum. Spyrjið Nám, um tit ivast í onkrum.)

Kjakist síðani um úrslitini.

Tosið síðani um tað hvat tit halda um, at børn arbeiða. Nær arbeiða børn ov nógv? Verða børn viðfarin væl á arbeiðnum? Hvør er munurin á frítíðararbeiði og at hjálpa til við húsligum arbeiði?

**Spurnaskjal um frítíðararbeiði**

1. Hevur tú frítíðararbeiði? Ja ________ Nei ________

2. Hvussu nógvar tímar arbeiðir tú í meðal um vikuna? ______________________________ tímar

3. Hvussu nógv tjenar tú í meðal um vikuna? ______________________________ krónur

4. Hevði tú arbeitt meiri, um tú fekst møguleikan fyri tí? Ja ________ Nei ________

5. Hvørjum arbeiðir tú við? ______________________________

6. Hvat brúkar tú pengarnar til? ______________________________

| 7. Hevur tú nakra viðmerking til evnið? |
| --- |
| |



# Hugsjónir

Næmingabók, síða 71-78

Førleikar:

- At orða fakligar ivamálsorðingar og svara teimum. At skilja millum ivamálsorðingar og háttaløg á ymiskum taksonomiskum stigum (Bloom).
- At leggja fram faklig úrslit munnliga. At brúka ymiskar framløguhættir, m.a. eisini at brúka KT at stuðla framløgur við.

Býtið flokkin sundur í tríggjar bólkar: ein bláan, ein grønan, ein reyðan og ein gráan. Hvør bólkur fær nú sum uppgávu at skipa ein flokk: Tey bláu skipa ein liberalistiskan flokk, tey grønu skipa ein konservativan flokk, og tey reyðu skipa ein sosialistiskan flokk.

Flokkarnir fáa síðani nøkur evni at viðgera, t.d. skúli, umhvørvi og skattur. (Til ber eisini at skifta evnini út við okkurt annað evni, ið flokkurin hevur áhuga í).

Síðani evna teir tríggir bólkarnir til hvør sína talvu, har tey semjast um hvønn politikk, tey vilja føra. Ivast tit í hvat hugsjónirnar standa fyri, ber til at hyggja í lærubókina.

| | Hví hevur hetta stóran týdning út frá liberalistiskum sjónarhorni? | Hvat er tann størsti trupulleikin út frá liberalistiskum sjónarhorni? | Hvat skulu vit gera fyri at loysa trupulleikan á ein liberalistiskan hátt? | Hvussu skal loysnin fíggjast út frá einum liberalistiskum sjónarhorni? |
|---|---|---|---|---|
| Skúli | | | | |
| Umhvørvi | | | | |
| Skattur | | | | |

| | Hví hevur hetta stóran týdning út frá konservativum sjónarhorni? | Hvat er tann størsti trupulleikin út frá konservativum sjónarhorni? | Hvat skulu vit gera fyri at loysa trupulleikan á ein konservativan hátt? | Hvussu skal loysnin fíggjast út frá einum konservativum sjónarhorni? |
|---|---|---|---|---|
| Skúli | | | | |
| Umhvørvi | | | | |
| Skattur | | | | |

| | Hví hevur hetta stóran týdning út frá sosialistiskum sjónarhorni? | Hvat er tann størsti trupulleikin út frá sosialistiskum sjónarhorni? | Hvat skulu vit gera fyri at loysa trupulleikan á ein sosialistiskan hátt? | Hvussu skal loysnin fíggjast út frá einum sosialistiskum sjónarhorni? |
|---|---|---|---|---|
| Skúli | | | | |
| Umhvørvi | | | | |
| Skattur | | | | |

At enda leggur ein talsmaður fyri hvønn flokk fram politikkin hjá flokkinum. Hini stuðla sjálvandi talsmanninum og leggja afturat, um okkurt vantar at sigast.

# Javnstøða

Nemingabók, síða 80-84

Førleikar:

- At lesa einfaldar hagtalsmyndir og tabellir. At lesa størri, torskildari hagtalstilfar, umframt at samanbera ymisk hagtøl.
- At eygleiða einfaldar samfelagsligar samanhangir í nærumhvørvinum. At gera kanningararbeiði úti í samfelagnum, har smærri einfaldar samrøður ella spurnakanningar verða nýttar.

Heimasíðan hjá Studna (www.studni.fo > Hagtøl) hevur hagtøl fyri kynsbýti av lesandi føroyingum.

Teknið tølini upp sum linjumyndir. Hvørji mynstur síggja tit?

Gerið hugarok í flokkinum um hvørjar orsøkir kunnu vera til gongdirnar í tølunum.

Kjakist um hvørjir aðrir møguleikar eru at fara á miðnámsskúla ella á hægri útbúgving. Eru møguleikarnir ymiskir hjá dreingjum og gentum?

**Lesandi á miðnámsskúlunum í Føroyum**
**býtt á kyn og skúlaár**

| | Kvinnur | Menn | Samlað |
|---|---|---|---|
| 2004/05 | 980 | 657 | 1637 |
| 2005/06 | 1010 | 727 | 1737 |
| 2006/07 | 1082 | 712 | 1794 |
| 2007/08 | 1097 | 752 | 1849 |
| 2008/09 | 1206 | 842 | 2048 |
| 2009/10 | 1240 | 929 | 2169 |
| 2010/11 | 1304 | 1010 | 2314 |
| 2011/12 | 1273 | 1041 | 2314 |
| 2012/13 | 1342 | 1046 | 2388 |
| 2013/14 | 1345 | 972 | 2317 |
| 2014/15 | 1355 | 975 | 2330 |
| 2015/16 | 1310 | 974 | 2284 |

**Lesandi á hægri útbúgvingum í Føroyum**
**býtt á kyn og skúlaár**

| | Kvinnur | Menn | Samlað |
|---|---|---|---|
| 2004/05 | 288 | 273 | 561 |
| 2005/06 | 289 | 304 | 593 |
| 2006/07 | 316 | 273 | 589 |
| 2007/08 | 314 | 284 | 598 |
| 2008/09 | 367 | 338 | 705 |
| 2009/10 | 346 | 401 | 747 |
| 2010/11 | 380 | 493 | 873 |
| 2011/12 | 396 | 507 | 903 |
| 2012/13 | 405 | 580 | 985 |
| 2013/14 | 416 | 495 | 911 |
| 2014/15 | 442 | 462 | 904 |
| 2015/16 | 502 | 471 | 973 |



| | 2015/16 | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Kvinnur | | Menn | | Í alt |
| **Í Føroyum** | 502 | 52% | 471 | 48% | **973** |
| **Uttanlands** | 837 | 57% | 622 | 43% | **1459** |
| **Í alt** | 1339 | 55% | 1093 | 45% | **2432** |

# 4 Búskapur – meiri enn bara pengar

Undirvísingargongdir:

- Pengar – drívmegin í búskapinum
- Búskaparligu geirarnir
- Almennur búskapur




Mynd: Napoleon Smith, 2019

# Pengar – drívmegin í búskapinum

Næmingabók, síða 87-94

Førleikar:

- At lesa einfaldar hagtalsmyndir og tabellir. At lesa størri, torskildari hagtalstilfar, umframt at samanbera ymisk hagtøl.
- At eygleiða einfaldar samfelagsligar samanhangir í nærumhvørvinum. At gera kanningararbeiði úti í samfelagnum, har smærri einfaldar samrøður ella spurnakanningar verða nýttar.

Hvør næmingur ger eitt yvirlit yvir egnan búskap. Fyrst ger næmingurin eina meting av hvussu nógv verður brúkt til hvat. Síðani kjakast næmingurin við síðunæmingin um hvussu privatbúskapurin kann betrast.

| **Búskaparyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Inntøkur** | **Um mánaðin** | |
| Løn (eftir skatt) | | kr. |
| Lummapengar | | kr. |
| **Samanlagt** | | **kr.** |
| **Útreiðslur** | | |
| Fartelefon og annað samskifti | | kr. |
| Klæðir og skógvar | | kr. |
| Smyrsl og onnur kropsrøkt | | kr. |
| Bøkur og bløð | | kr. |
| Tónleikur, filmar, spøl og annað undirhald | | kr. |
| Góðgæti, drekkivørur og máltíðir | | kr. |
| Ferðing innlendis | | kr. |
| Uttanlandaferðir alt íroknað | | kr. |
| Ítrótt og annað frítíðarvirksemi | | kr. |
| Konsertir, biografur og onnur líknandi tiltøk | | kr. |
| **Samanlagt** | | **kr.** |
| **Aðrar útreiðslur** (um okkurt vantar omanfyri) | | |
| | | kr. |
| | | kr. |
| | | kr. |
| | | kr. |
| **Samanlagt** | | **kr.** |
| **Uppsparing** | | |
| (til størri ting, tú ynskir tær, ferðir, festivalar o.l.) | | **kr.** |
| **Yvirskot/undirskot** | | |
| Inntøkur - (útreiðslur + uppsparing) | | **kr.** |

# Búskaparligu geirarnir

Næmingabók, síða 96-104

Førleikar:

- At lesa einfaldar hagtalsmyndir og tabellir. At lesa størri, torskildari hagtalstilfar, umframt at samanbera ymisk hagtøl.
- At fremja samfelagsfrøðiligar kanningar, bæði av kvalitativum og kvantitativum slagi. At skilja, nær teir ymisku kanningarhættirnir eru hóskandi at brúka.
- At leita sær týðandi og álítandi vitan, bæði gjøgnum internetið og fysiskar miðlar. At nýta grundleggjandi keldukritikk.

Á Hagstovuni er eina hagtalsgrunnur, ið nevnist “Framleiðsluuppgerð í ársins prísum skift á geirar”. Han er at finna undir “Geirar í tjóðarroknskapi” undir “Tjóðarbúskapur”.

- Finn út av hvussu úrtøkan hjá ymisku geirunum hevur verið seinastu árini
- Rokna síðani út hvør geiri hevur havt størstan vøkstur í tíðarskeiðnum
- At enda gert tú eitt lagkøkumynd ella stabbamynd, ið sýnir býtið millum geirarnar í nýggjasta árinum




Til ber eisini at fáa tølini út í Excel ella annað rokniark.



# Almennur búskapur

Næmingabók, síða 106-111

Førleikar

- At lesa einfaldar hagtalsmyndir og tabellir. At lesa størri, torskildari hagtalstilfar, umframt at samanbera ymisk hagtøl.
- At fremja samfelagsfrøðiligar kanningar, bæði av kvalitativum og kvantitativum slagi. At skilja, nær teir ymisku kanningarhættirnir eru hóskandi at brúka.
- At leita sær týðandi og álítandi vitan, bæði gjøgnum internetið og fysiskar miðlar. At nýta grundleggjandi keldukritikk.

Á heimasíðuni hjá Taks er ein breddi, ið nevnist “Gjøld og ágóðar”. Her ber til at finna út av hvørji gjøld tað almenna tekur frá borgaranum, men eisini hvørji gjøld verða latin aftur til borgaran. Být flokkin í bólkar, ið viðgera hvør sítt evni. Aftan á leggur hvør bólkur fram um sítt evni. Lærarin viðmerkir, um okkurt vantar.

Tosið m.a. um hvørjar upphæddir verða tiknar, um øll rinda líka nógv, um tað eru borgarar ella arbeiðsgevarar, ið rinda o.s.fr.

Ikki er neyðugt at taka øll evnini við. Tit kunnu avgera í flokkinum at viðgera t.d. 5 evni.



# 5 Føroyskur búskapur og vælferð

Undirvísingargongdir:

- Føroyskur búskapur og útflutningur
- Føroyska vælferðarsamfelagið




Mynd: Napoleon Smith, 2019



# Føroyskur búskapur og útflutningur

Næmingabók, síða 115-126

Førleikar

- At lesa einfaldar hagtalsmyndir og tabellir. At lesa størri, torskildari hagtalstilfar, umframt at samanbera ymisk hagtøl.
- At fremja samfelagsfrøðiligar kanningar, bæði av kvalitativum og kvantitativum slagi. At skilja, nær teir ymisku kanningarhættirnir eru hóskandi at brúka.
- At leita sær týðandi og álítandi vitan, bæði gjøgnum internetið og fysiskar miðlar. At nýta grundleggjandi keldukritikk.

Í 2018 var heildarveiðan hjá føroyingum 660.056 tons.

Talvan sýnir tey fiskasløgini, føroyingar veiddu mest av.

Til ber at býta fisk í ymiskar bólkar, m.a. hesar

- Botnfiskur
- Flatfiskur
- Uppisjóvarfiskur
- Skeljadjór
- Annað

Farið í 5-6 bólkar, og býtið fiskasløgini ímillum tykkum. Finnið út av hvønn bólk fiskarnir hoyra til og lesið annars ymisk um fiskaslagið. Hvør bólkur velur síðani eitt fiskalag at leggja fram fyri restini av flokkinum. (Minnist til at finna eina góða mynd at vísa á stórskíggja.)

Til ber at finna upplýsingar um flestu fiskasløgini á fiskasavninum á Snar: https://www.snar.fo/fiskar

Eisini ber til at brúka leitikassan ovast á síðuni til at finna fiskasløg.

| Nr. 2018 | Fiskaslag | Tons |
|---|---|---|
| 1 | Svartkjaftur | 350.508 |
| 2 | Sild | 93.706 |
| 3 | Makrelur | 81.130 |
| 4 | Toskur | 43.578 |
| 5 | Upsi | 26.139 |
| 6 | Lodna | 14.450 |
| 7 | Gullaksur | 12.087 |
| 8 | Hýsa | 9.086 |
| 9 | Longa | 5.280 |
| 10 | Rækja | 5.174 |
| 11 | Svartkalvi | 3.750 |
| 12 | Kongafiskur | 3.325 |
| 13 | Jákupsskel | 3.174 |
| 14 | Brosma | 2.046 |
| 15 | Brislingur | 1.287 |
| 16 | Havtaska | 1.281 |
| 17 | Blálonga | 1.115 |
| 18 | Stinglaksur | 553 |
| 19 | Prikkafiskur | 388 |
| 20 | Liri | 351 |
| 21 | Reyðsprøka | 291 |
| 22 | Hvítingur | 278 |
| 23 | Tunga | 261 |
| 24 | Skøta | 145 |
| 25 | Høgguslokkur | 122 |
| 26 | Hávur | 89 |
| 27 | Steinbítur | 73 |
| 28 | Kalvi | 56 |
| 29 | Krabbi | 33 |
| 30 | Hummari | 30 |

*(Viðmerking: Svartkjaftur verður vanliga roknaður sum uppisjóvarfiskur. Upsi verður vanliga roknaður sum botnfiskur.)*

# Føroyska vælferðarsamfelagið

NEmingabók, síða 128-137

Førleikar

- At lesa og endurgeva einfaldar hugtaksmyndlar. At knýta hugtaksmyndlar til kvantitativa og kvalitativa vitan.
- At eygleiða einfaldar samfelagsligar samanhangir í nærumhvørvinum. At gera kanningararbeiði úti í samfelagnum, har smærri einfaldar samrøður ella spurnakanningar verða nýttar.

Gerið 8 ørk við hvør síni vælferðarveiting skrivað í miðjuna. Síðani verða papírini send í umferð í flokkinum, soleiðis at hvør næmingur skrivar okkurt, hann veit um veitingina. Er talan um okkurt nýtt, ber til at gera nýggjan bolla (sí niðast til vinstru). Er talan um útdýpandi vitan um okkurt, ið longu er skrivað, ber til at gera ein bolla út frá einum bolla (sí niðast til høgru.

- Fólkaskúli
- Barnagarðar
- Røktarheim
- Tannlækni
- Kommunulækni
- Sjúkrahús
- Ungdómshús
- Fitness

(Til ber eisini at skifta onkra veiting út við onkra aðra, alt eftir hvat næmingarnir hava áhuga í.)

At enda verða papírini tikin upp á stórskíggja og viðgjørd í flokkinum.




(Øll venjingin kann eisini gerast við at brúka okkurt hugarokstól sum t.d. Mindmup, ið er brúkt til at tekna dømið omanfyri. Tá kunnu bólkarnir í staðin senda leinkið millum sín.)